## Journalistlesandi hóp-neyðtikin

Ein journalistlesandi ensk kvinna fyrst í 30-unum varð í gjár hóp-neyðtikin í einari legu fyri flóttafólk, sum bíða eftir at søkja um innferðarloyvi til Onglands. Legan er í franska havnabýnum Calais. Legan, nevnd »The Jungle«, er savningarstað fyri fólk av afrikanska meginlandinum og eysturlondum, sum ætla sær at sleppa til Onglands at búgva. Kvinnan var komin til Calais at skriva um fólkini, sum búgva sum best ber til, tá hon varð álopin av seks afganskum monnum og neyðtikin. Franska løgreglan hevur avhoyrt 200 menn og heldur aftur tíggju teirra til nærri avhoyringar. 31 ára gamla kvinnan ætlaði at verða saman við nøkrum av ætlandi innflytarunum í eina tíð og skriva um teirra lagnur. Umleið 500 asylsøkjandi fólk liva í The jungle, sum liggur í einum ónýttum vinnuøki fáar metrar frá havnini.



# Føroyskir filmar innstillaðir til altjóða filmsfestival

**Super8-filmurin "Fragmented Unison" og "The Collar Red" eru innstillaðir til altjóða filmsfestivalin "Budapest International Short Film Festival", sum verður í næstu viku**

FILMUR
*Tíðindaskriv*

Super8-filmurin "Fragmented Unison" hjá MARMAR (Marianna Mørkøre & Maria Arnell), sum bleiv tikin upp í samband við fotomyndarøðina "Fragmented Unison", er nú innstillaður til besta eksperimentella stuttfilm á "Budapest International Short Film Festival". Festivalurin verður hildin 3.-7.september og er ein av teimum stóru stuttfilmsfestivalunum í Evropa. Í ár vóru 620 filmar latnir inn til festivalin, har Fragmented Unison er millum teir 90 útvaldu filmarnar. 7 filmar eru innstillaðir til Best Experimental.

Harumframt er stuttfilmurin "The Collar Red" hjá Mariannu Mørkøre innstillaður til besta eksperimentella stuttfilm á "International Festival of Cinema and Technology" í USA. IFCT er ein ferðandi filmsfestivalur, sum hevur sýningar innan tær ymisku filmslistagreinirnar alt árið ymsastaðni í heiminum. Herfyri bleiv "The Collar Red" vístur á einum Dance-on-Screen tiltaki á Filipsoyggjununum.

Báðir filmarnir eru at síggja á heimasíðuni hjá MARMAR, www.marmar.nu

Beinleiðis leinki:
http://www.marmar.nu/film_fu.htm
http://www.marmar.nu/film_collarred.htm



# Kreativir verkstaðir á Tøting í Syðrugøtu

**Handverk, list og nýskapan fáa nú nýggjar og góðar umstøður í bygningunum hjá Tøting í Syðrugøtu. Fólk, sum hava skapandi evnir og hug, fáa nú møguleikan at tilevna lutir og listaverk. Møguleikar verða at leiga sær hølisumstøður í Tøting, har møguleiki eisini verður at sýna fram og sjálvi selja sínar vørur til tey nógvu vitjandi**

VERKSTAÐIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tøting hevur nógv ár á baki sum serstakur framleiðari og handil við føroyskum sniðgivnum ullavørum. Nógv túsund vitjandi, bæði útlendingar og føroyingar, vitja á hvørjum ári.

Í tíðindaskrivi sigur Tøting, at tey nú fara at geva fólki møguleikar at menna aðrar handverks-og listagreinir og skapa eitt fjøltáttað umhvørvið í bygningunum í Syðrugøtu.

- Tað eru ikki aðrir verkstaðir í landinum, har handverk og nýskapan á egnum støði og treytum skipa síni arbeiðir. Tað kann tí eisini vera mennandi at virka undir felags lon og fáa íblástur og møguleika at sýna fram og selja sínar vørur og verk og samstundis fáa samband við áhugaðar keyparar.

Hallberu Ólavsdóttir vísir á, at kreativir verkstaðir og nýskapan verður flokkað innan mentan og list og hevur politiska fráboðanin víst á, at hesi øki verða raðfest frammaliga.

- Tað er tí øll orsøk at halda, at einstaklingar, ið kanska ganga heima og takast við slíkt, kunnu fáa stórt gagn av at møtast og virka á einum stað og her skapa bond og hugflog og víðka um síni arbeiðsøki.

Hon sigur, at ítøkiliga ætlanin er at skipa umstøður soleiðis at fleiri handverks- og listagreinir skulu kunna virka í nøkrum av stóru hølunum hjá Tøting. Neyvt er ikki ásett enn, hvussu einstøku greininar skulu skipast hvør sær.

- Kanska vilja nøkur hava meiri felags hølisumstøðir og onnur kanska sín egna bás ella arbeiðshøli. Hesum verður samráðst um við einstøku áhugaðu fólkini, sigur hon.

Ætlandi verður kostnaður fyri leigu í hølum Tøtings um 1.500 kr. um mánaðin fyri hvønn einstakan.

- Tey, sum hava áhuga fyri hesum, kunnu venda sær til okkum, sigur Hallbera Ólavsdóttir.

